# Tá listin livir og ávirkar

**– List skal vilja nakað, og hon skal flyta bæði seg sjálva og onnur. Hetta halda ungu, framfýsnu fyrireikarnir av ársins ólavsøkuframsýning, sum ikki eitur Ólavsøkuframsýningin, men Slóarblóð**

ÓLAVSØKULIST

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Ólavsøkuframsýningin er ein institutión í føroyska listakalendaranum og í ólavsøkuskránni. Men í ár verður nýtt lív sprænt inn í hesa heldur stirvnu siðvenju.

Slóarblóð er bleyta kjarnan í hørðu hornunum á veðri. Veðrurin er ímyndin av føroyskari mentan, men um harða fasadan skal vaksa og mennast, skal livandi, flótandi blóð til.

Listafelagið hevur í ár valt at lata tveir ungar menn skipa fyri listafrámsýningini á ólavsøku. Og hesir ætla at umskapa Listaskálan til eina blóðreyða heildarupplivilng av tí ungu, livandi listini.

21 ára gamli Jóannes Lamhauge hevði sína fyrstu einstaklingaframsýning sum 13 ára gamal. Hann er kanska best kendur sum høvðussangarin í Dreymakotinum, men málningalistin liggur ovast á raðfestingarlistanum. Heiðrikur á Heygum, sum er 23 ára gamal, luttók á Ólavsøkuframsýning, tá hann var tólv. Í dag lesur hann film í London, men er eisini mest upptikin av málningalist.

Sambært nýggju fyrireikarunum tørvar Ólavsøkuframsýningini eitt face-lift.

– Nógv gott hevur verið við, men tað hevur verið ov blandað, og gáttin hevur verið ov lág. Tí hava tað eisini verið ov fá vitjandi, og ummælini hava heldur ikki verið góð.

Men í ár skal tað vera øðrvísi, siga teir báðir.

Fyrsta krav til ársins listafólk, er at tey skulu vera millum 18 og 30 ára gomul.

– Hetta er fyri tað mesta ókend listafólk. Ongin kennir tey, men vit eru ótrúliga hugtiknir av dygdini í tí, sum vit hava sæð. Tey, sum duga, duga ótrúliga væl, sigur Heiðrikur á Heygum.

– Og vit eru sera stoltir av at vera við til at fáa hetta ættarliðið fram í ljósið, staðfestir Jóannes Lamhauge.

## Tær ósøgdu søgurnar

Føroysk málningalist hevur verið sermerkt av føroyska landslagnum. Og hóast føroyska listin hevur havt sínar útbrótarar, so halda ungu fyrireikarnir av Slóarblóð, at henda tunga føroyska siðvenjan køvir allar hinar søgurnar.

– Tað eru so nógvar søgur, sum ikki verða fortaldar í føroyskari málningalist. Vit hava læst okkum føst í, at ein málningur er hav, hús, fjøll og luft. Er tað okkurt annað, so er tað ikki ein ordiligur málningur, sigur Heiðrikur á Heygum.

Samfelagið hevur broytt seg ótrúliga nógv hesi seinastu árini. Hetta endurspeglast sjálvandi í listini. Men hugmyndin av føroyskari list hevur ikki flutt seg. Vit knýta framvegis hugtakið list saman við serliga expressionistiskari landslagslist, sigur Jóannes Lamhauge.

– Tað stuttliga er, at innsendu verkini vísa eitt týðiligt nýtt rák í føroyskari list, sigur Heiðrikur.



Ofta verður sagt, at rákið í føroyskari list altíð liggur eitt sindur forskotið í mun til list aðrastaðni, men í hesum førinum halda Jóannes Lamhauge og Heiðrikur á Heygum, at føroyska rákið liggur sera tætt upp at rákinum í europeisku stórbýunum.

- Tey ungu listafólkini liva eitt ótrúliga globaliserað lív. Sjálvt tey, sum ikki ferðast nógv, hava allan heimin beint við hondina við sjónvarpsrásum og interneti. Og føroyska samfelagið er í dag eitt samansett samfelag, sigur Heiðrikur á Heygum.

– Nýggja tøknin setur nýggjar etiskar spurningar, sum listafólk mugu taka støðu til. Samstundis verða vit bombarderað við reklamum og øllum teimum hugasambondum, sum liggja í teimum. Listin í dag er tí nógva meira in your face, enn hon var fyrr, sigur ungi havnarmaðurin.

## Avbjóðandi dygd

Slóarblóð er ein uppgerð við deyða siðvenju og eina hálovan av spruttandi, livandi ungdómi. Men Jóannes Lamhauge og Heiðrikur á Heygum leggja dent á, at teir undir ongum umstøðum vilja slaka, tá umræður góðsku.

– Vit eru professionellir, og vit ganga inn fyri professionalismu. Eg haldi, at Listafelagið vísir okkum fult álit, tí tey síggja, at vit ganga høgt upp í góðsku, og vit gera okkara arbeiði til lítar, sigur Heiðrikur á Heygum.

Jóannes Lamhauge leggur dent á, at tað tekniska skal vera í lagi. Listin skal hava eina góða dygd og høgan standard. Men hon skal eisini vilja nakað, sigur Jóannes Lamhauge.

– List er samskifti, og góð list hevur okkurt upp á hjarta. Hon vil siga okkurt, og hon ynskir at ávirka hyggjaran.

Heiðrikur á Heygum sigur, at besta ummæli, hann nakrantíð hevur fingið, var einaferð mamma hansara hevði verið í brúdleyp. Í brúdleypinum, hoyrdi mamman tvey fólk í brúdleypinum tosa saman um eina framsýning, sum sonur hennara var við í. Uttan at vita, at hon er mamma listamannin, tosa tey um eina løgna mynd við fiski og blóði. Niðurstøða teirra var, at framsýningin var góð, men handan eina myndin var ov løgin.

– Einasti málningur, tey nevndu, var mín. Hitt var pent, men mín málningur sat eftir. Og tað er júst tað eg vil, sigur Heiðrikur á Heygum.

Jóannes Lamhauge slær fast, at veruliga listin liggur í rúminum millum løriftið og áskoðaran. Listin skal provokera fólk til at hugsa um, hvat list er. Einaferð hevði hann eina listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík, har allar myndirnar ímyndaðu pissilingar.

– Eldri fólk komu inn í Smiðjuna at keypa sær eina mynd. Tá tey komu inn, stúrsaðu tey við, og so skundaðu tey sær út ígjøgnum dyrnar aftur. Eg seldi heldur ikki so nógv, sigur hann flennandi.

– Eina aðru ferð hevði eg eina framsýning bara við málningum, sum eg visti, fóru at selja væl, og eg fekk rætt. Tað er stuttligt at eksperimentera við samskiftinum soleiðis.

## Stuðul heldur enn siðvenju

Jóannes Lamhauge og Heiðrikur á Heygum siga, at grundin til Slóarblóð varð løgd í Heinesens Húsi, har Bent Bruun av sínum eintingum byrjaði at samla børn og ung at mála. Fleiri av fremstu fólkunum á Slóarblóð eru komin úr hansara reiðri.

– Eg veit ikki, um eg yvirhøvur hevði málað, hevði eg ikki verið undir hansara veingjum fyrst, sigur Heiðrikur á Heygum.

– Tað, sum var so ótrúliga gott við Bent Bruun, var, at vit fingu loyvi til alt. Vit lærdu av egnum feilum, og vit sluppu at leita okkum fram til okkara egna útrykk, staðfestir Heiðrikur á Heygum.

Jóannes Lamhauge og Heiðrikur á Heygum halda báðir, at Bent Bruun ikki hevur fingið ta viðurkenning, sum hann hevur uppiborið fyri sítt megnararbeiði.

– Bent Bruun rættaði okkum ongantíð, hann gav okkum nógvan íblástur og vísti okkum nógva list. Men hann legði ikki eina ávísa siðvenju niður í okkum, siga teir báðir, sum kanska sjálvir eru góð dømir um, at tey ungu hjá Bent Bruun fingu loyvi at ganga egnar leiðir.

– Vit eru sera ymiskir, sigur Heiðrikur á Heygum.

Jóannes Lamhauge málar mest gomul fólk og roynir at taka støðu til stórar filosofiskar spurningar, meðan Heiðrikur á Heygum heldur seg til børn, djór og tað naiva og ólogiska.

– Men vit hava neosurrealismuna til felags. Og innsendu verkini vísa, at hetta rákið er gjøgnumgangandi í nógvari ungari list.

Jóannes Lamhauge og Heiðrikur á Heygum hava ongar ætlanir um, at Slóarblóð skal verða eitt afturvendandi tiltak. Men teir vænta, at framsýningin verður ein varði í føroyskari listasøgu.

Henda framsýningin er so øðrvísi, at hon kann ikki annað enn seta spor í søguna, halda teir. Slóarblóð fær veðrahorn at vaksa. Kanska henda framsýningin setur eitt veðrahorn eftir seg.